

## Oddabrak á Kambsdali

Tað líkist einum dysti hjá verjandi meistarunum móti teimum komandi, tá Dráttur fer á Kambsdal sunnudagin. ÍF hevur fyri tað nógva verið oddalið í kvinnudeildini, og fram til mikukvøldið tóktust tær sita sera tungt á oddasessinum. Tapið fyri KÍF hevur tó aftur lagt trýst á, og tí er ein sigur avgerandi neyðugur sunnudagin. Týdningurin fyri Drátt er tó eisini sera stórur, og tí fara báðir partar uttan iva at gera alt, sum stendur í teirra makt, til tess at vinna dystin.

## TB er stórfavorittur

Tað hevur gingist nakað striltið hjá flogbóltskvinnunum av Tvøroyri seinastu umførini, men sunnudagin eru tær at rokna sum stórfavorittar. Mjølnir kemur á vitjan í Trongisvági, og soleiðis sum úrslitini hjá Mjølni hava verið í ár, so er lítil ivi um, at hetta er ein dystur, sum TB skal vinna. Og enn er munurin upp til heiðursmerkini somikið lítil, og TB við einum sigri framvegis er væl við í tí stríðnum.

# Hava breiðari hóp

**- Vit hava ein breiðari hóp enn tær, og tí avhongur ikki so nógv av einum leikara hjá okkum. Hetta sigur Una Olsen hjá Stjørnuni. Hon væntar tó ein javnan dyst ímillum tvey lið, sum eru von við at spæla slíkar dystir ímóti hvørjum øðrum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Breidd og styrki á øllum plássum er hornasteinurin, sum skal tryggja Stjørnuni gullið leygardagin*

Stjørnan hevur verið tað liðið, sum hevur fingið bestu úrslitini í bestu kvinnudeildini í hondbólti seinnu árini. Á hvørjum ári hava tær verið við í oddinum í landskappingini, og harðasta kappingin hevur aloftast komin frá VB og Neistanum.

Eisini í steypakappingini hava úrslitini hjá Stjørnuni verið góð. Tær hava verið mest sum fastur fúsur í steypafinaluni hjá kvinnum seinnu árini, og í ár er einki undantak í so máta. Hesaferð er tað VB, sum bíðar í finaluni, og Stjørnan má undan dystinum taka til takkar við at vera favorittur.

Í landskappingini liggja tær fremst, og í steypakappingini vistu tær eina øgiliga styrki, tá tær møttu Neistanum, sum liggur á øðrum plássi í landskappingini, í hálvfinaluni. Her vunnu tær við heili 16 málum í Havnini, meðan seinni dysturin eisini endaði við einum tryggum sigri til Stjørnuna.

Hetta eru nakrar av orsøkunum til, at Stjørnan er favorittur, men í eini finaluna kann alt henda.

### Allar eru tøkar

Tá Stjørnan spældi dyst í landskappingini síðsta sunnudag ímóti StÍF, máttu tær vera ein av sínum mest týðandi leikarum fyri uttan. Alina Olaru sat nevniliga uttan fyri í tí dystinum við einum skaða í knænum, men Una Olsen hjá Stjørnuni sigur, at Alina er klár at spæla aftur.

- Vit valdu at lata Alina hvíla síðsta vikuskiftið, tí hon hevði ávísar trupulleikar við knænum. Hon hevur tó vant í vikuni, og hon tykist ikki at hava nakrar stórvegis trupulleikar nú, so hon verður heilt sikkurt klár til steypafinaluna. Annars haldi eg, at allar eru tøkar til dystin leygardagin, so vit mugu bara royna at koyra á.

- Dystirnir millum okkum og VB eru næstan altíð spennandi, og eg vænti ikki, at hesin verður nakað undantak. Vit hava tað ofta trupult í Vági, meðan tær hava tað trupult norðuri í Klaksvík, so nú verður spennandi at síggja, hvat tað endar við. Vit ætla okkum í øllum førum at vinna, sigur Una Olsen.

### Skulu steðga Daivu

Tað er eingin loyna, at VB hevur ein sera sterkan leikara í Daivu Tuomaite. Una ásannar eisini, at Daiva er ein góður leikari, men hon væntar eisini, at aðrir leikarar hjá VB kunnu geva trupulleikar.

- Daiva er ein ótrúliga góður leikari, og hon hevur ómetaliga nógv at siga fyri tær. Hon er heilt sikkurt tann leikarin hjá teimum, sum vit skulu halda eyga við. VB hevur tó eitt gott lið, og tær fáa sikkurt eisini Gurið Mortensen heim til dystin úr Danmark. Gurið kann fáa ein týdningarmiklan leiklut fyri tær, so hetta er eisini ein leikari, sum vit mugu ansa eftir.

Una leggur afturat, at málmenninir helst fara at fáa ein stóran leiklut í dystinum, men at teirra avrik eisini fer at ávirkast av verjuspælinum.

Una sigur at enda, at um allar taka ábyrgd, so skal tað nokk fara at ganga.

- Vit hava ein breiðari hóp enn tær, og taka allir leikararnir ábyrgd, so vera vit ringar at steðga leygardagin.

# Skulu steðga bakspælarunum



*Liðið, sum fyrst sleppur av við nervarnar í dystinum, kann fáa ein avgerandi fyrimun, heldur Rannvá Johannesen hjá VB*

**- Seinast høvdu vit sera gott tak á teirra vongspælarum, so nú mugu vit royna at steðga teirra bakspælarum eisini. Hetta sigur Rannvá Johannesen hjá VB, sum væntar sær eina spennandi finalu ímóti Stjørnuni**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyri nøkrum árum síðani vóru tað VB og Stjørnan, sum myndaðu oddin í bestu kvinnudeildini í Føroyum. Dystirnir ímillum hesi bæði liðini vóru altíð ótrúliga spennandi. Sjálvt um VB ikki hevur fingið so góð úrslit síðstu árini, so plaga dystirnir ímillum VB og Stjørnuna altíð at vera spennandi, og tað verður steypafinalan í ár helst eisini.

VB var ikki partur av steypafinaluni hjá kvinnum í fjør, tá Neistin og Stjørnan brustu saman. Í ár eru tær tó aftur við í finaluni, har tær skulu møta Stjørnuni. Vegurin til finaluna var tó ikki so léttur. Tær fingu eina dreymabyrjan, tá tær vunnu við seks málum á Kyndli í Havn í fyrru hálvfinaluni, men á heimavølli mundi gingið galið. Her førdi Kyndil við átta málum eitt skifti í seinna hálvleiki, men VB fekk akkurát minka um kyndilsleiðsluna so mikið, at tær sluppu í steypafinaluna. Kyndil vann dystin við fimm málum, men VB var klárt til finaluna.

### Gurið kemur heim

Rannvá Johannesen hjá VB væntar sær eina spennandi finaludyst ímóti Stjørnuni leygardagin.

- Tað verður ein spennandi dystur. Vit eru sera uppsettar til dystin, og dystirnir ímillum okkum og Stjørnuna eru ofta sera spennandi. Eg vænti, at finalan verður merkt av